# Ætla at byggja skúla fyri slakar 60 mió krónur

**– Eitt skitsuprojekt fyriliggur, og vit hava nú gjørt eina arbeiðsætlan, har vit saman við ráðgevum og byggifelagnum, Articon, skulu finna út av, hvussu nógv ein slíkur skúli kann byggjast fyri. Ætlanin er at taka endaligu avgerðina fyri summarfrítíðina, sigur borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen**

SKÚLABYGGING
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Fyri góðari viku síðan skrivaðu umboð fyri Runavíkar kommunu, byggifelagið Articon og ráðgevarar hjá kommununi, arkitekturin Eyðun Petersen og ráðgevandi verkfrøðingafeløgini, Landsbyggifelagið og Sofus M. Jakobsen, undir eina sonevnda partalagsavtalu.

Kommunan hevur latið gera eitt skitsuprojekt til nýggjan skúla við Løkin í Runavík, og endamálið við avtaluni, sum nú er undirskrivað, er í fyrsta lagi at finna út av, hvussu nógv ein slíkur skúli kemur at kosta.

### Slakar 60 mió kr.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, sigur, at tað liggur ikki meira í hesi partalagsavtalu enn tað, at kommunan vil hava málið um skúlabygging betri l‡st og kostnaðarmett, soleiðis at endalig støða umsíðir kann takast móti sumri.

– Áðrenn vit taka endaliga støðu, mugu vit vita ítøkiliga, hvat tað er, vit taka støðu til, sigur hann.

Borgarstjórin vísir á, at við í avtaluni er ein tíðarætlan upp á tríggjar mánaðir, soleiðis at býráðið væntandi kann taka endaliga støðu til møguliga bygging fyri summarfrítíðina.

– At byggja nýggjan skúla í Runavíkar kommunu, er ikki nøkur nýggj ætlan, men hon røkkur fleiri ár aftur í tíðina.

Hann sigur, at tað, sum skitsuprojektið leggur upp til, er ein nýggjur skúli við Løkin í Runavík, sum verður umleið 3.700 fermetrar stórur.

– Vit miðja eftir, at skúlin fæst fyri einar 57 mió krónur og kemur at standa liðugur á heysti 2008.

### Gamli skúlin

Rodmundur sigur, at fleiri fundir hava verið í kommununi um skúlabygging, og ymiskt hevur verið frammi um, hvussu fram skal farast.

– Vit hava eisini umrøtt spurningin um at byggja í stigum, men kann skúlin fáast upp fyri slakar 60 mió krónur, hugsa vit okkum, at meginparturin av verkætlanini verður framd undir einum.



*Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, Eyðun Petersen, arkitektur og danski ráðgevin, Charlotte Nørbak, skoða økið, har ætlanin er at byggja nýggja skúlan við Løkin í Runavík*

Spurningurin um, hvussu nógv kommunan megnar í einum, verður soleiðis eisini umrøddur, og endaliga avgerðin verður eisini tikin hareftir, sigur hann.

Borgarstjórin vísir á, at við í kanningararbeiðnum, sum nú verður gjørt, er eisini spurningurin, um gamli framhaldsskúlin í Runavík skal umvælast ella rívast niður.

– Endalig støða er ikki tikin til hetta enn, leggur Rodmundur Nielsen aftrat.

# Tveir skúlar – og ikki fýra

**– Upp á longri sikt ætla vit at hava tveir skúlar í økinum heldur enn f‡ra, sigur formaðurin í mentanarnevndini í Runavíkar kommunu, Hans Petur Ellingsgaard**

SKÚLAR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*Nú nýggjur skúli ætlandi verður bygdur í Runavík, er væntandi, at skúlarnir í Søldarfirði og Rytuvík sum frá líður verða niðurlagdir*

Mynd: Vilmund Jacobsen

– Ætlanin er, at barnaskúli til og við 3. flokk skal verða í verandi skúla á Glyvrum, og síðan skulu restin av næmingunum ganga í skúlanum, sum bygdur verður í Runavík.

Tað sigur Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentanarnevnd Runavíkar býráðs.

### Um nøkur ár

Hann vísir á, at enn hevur Runavíkar kommuna ikki endaliga gjørt av, um bygt verður í einum ella fleiri byggistigum í Runavík.

– Verður bygt yvir fleiri ár, fara vit framhaldandi at hava fýra skúlar í nøkur ár aftrat, men verður alt bygt og møguliga umbygt í einum, er hugsandi, at vit fara at hava tveir skúlar – og ikki fýra – í Runavíkar-økinum um eini tvey ár ella so, sigur formaðurin í mentanarnevndini, Hans Petur Ellingsgaard.

### Grannar byggja

Vit kunnu leggja aftrat, at Tofta skúli eisini verður útbygdur í hesum døgum, og henda verkætlanin kostar stívliga 40 mio krónur.

So, tilsamans verður talan um einar 100 mió krónur til skúlabygging í hesum báðum grannakommununum næstu árini.

# Fiskavirkir skilja og avhøvda smáan upsa

**Ein partur av arbeiðnum hjá nøkrum fiskavirkjum í vár hevur verið at skilja og avhøvda smáan upsa, sum reiðaríini síðan hava keypt aftur til innfrystingar og útflutnings**

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Fyri eini tíð síðan stúrdu eygleiðarar í fiskivinnuni, skip og sølufeløg fyri, at føroyski upsamarknaðurin fór at kollapsa í vár.

Fiskiskapurin var framúr góður, og ikki var líkt til, at virkini fóru at megna at keypa og arbeiða allan fiskin undan.

Um hesa tíðina í fjør lógu russisk skip kring landið og innfrystu smáan upsa, men í ár vildi Fiskimálaráðið ikki geva loyvi til hetta.

### "Ventilurin"

Spurningurin var, hvørji ráð so vóru til at taka fyri at skapa ein "ventil", soleiðis at upsamarknaðurin ikki sprongdist.

Hendan ventilin hava reiðaríini og fiskavirkini saman við frystivirkjum skapt í felag.

Jákup Eli Thomsen, virkisleiðari á Fiskavirking í Vestmanna, sigur, at fleiri virkir hava keypt allan upsan frá trolarunum, og síðan hava tey, tá ið mest hevur staðið á, skilt, avhøvdað og selt tann smáa upsan aftur til reiðaríini, sum síðan hava latið hann frysta á frystivirkinum í Kollafirði.

Smái upsin er síðan seldur av landinum, avhøvdaður og óvirkaður.

### Góð loysn

Jákup Eli Thomsen sigur, at fiskavirkini á henda hátt hava havt ávirkan á, hvussu nógvur fiskur er farin til frystingar og útflutnings óvirkaður – og ikki sum í fjør vár, tá ið reiðarí og sølufeløg stýrdu hesum partinum.

Hann sigur, at tey á virkjunum hjá Fiskavirking í Vestmanna, Saltangará og í Havn



Mynd: Birgir W. Høgnesen

– og á øðrum virkjum, hava skilt og avhøvdað nøkur 100 tons av smáum upsa, sum er farin til frystingar.

– Hetta hevur ikki givið okkum tær stóru inntøkurnar, men á henda hátt hava vit verið við til at stýrt útflutninginum av óvirkaðum fiski í eini tíð, har virkini – og harvið eisini skipini – høvdu komið í trupulleikar, tí upsafiskiskapurin var so góður.

Jákup Eli Thomsen sigur, at seinastu dagarnar hevur fiskiskapurin hjá partrolarunum verið lakari aftur.